# HEILSANIR



Vit takka hjartaliga fyri sýndan heiður á gullbrúdleypsdegi okkara 2. november 2007
**Tordis og Regin á Rógvi, Vestmanna**

Hjartaliga tillukku við fimtiára degnum og alt gott í framtíðini.
**Ynskja vit tær Irdi, Kaysten og børnini**

Eg og foreldur míni takka øllum tykkum, ið gjørdu mína ferming 25. mars ógloymandi. Ein serstøk tøkk til tykkum øll, sum hjálptu til at gera dagin møguligan.
**Natasha á Lofti Gren, Argir**

**Góði Villiam**
Hjartaliga tillukku við føðingardgnum. vit elska teg soooo nógv.
**Mamma, babba og Bartal Páll**

**Góði Jónas**
Hjartaliga tillukku við 5 ára føðingardegnum.
**Ynskja langomma og langabbi á Eiði**

Hjartaliga tillukku við fimti ára degnum og alt gott í framtíðini.
**Ynskja vit tær systkini**

**Góði Eddi**
Hjartaliga tillukku við sjeyti ára føðingardegnum ið var tann 20. november.
**Heilsan starvsfelagirnir á Marco Polo og Cleopatra**

Sosialurin

## Heilsanir

kr. 30,-

### Gevið gætur

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við kr. 30,- fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Tórsgøtu 1, millum kl. 8.00 og 16.00

**Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 1 dag fyri útkomudag.** Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.

☐ Mán. ☐ Týs. ☐ Mik. ☐ Hós. ☐ Frí.

Tekstur:

**Myndina aftur:** Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði. Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).

Navn:

Bústaður:

Bygd/býur: Tlf.:

Sendið lepan, v/mynd og gjald til:

Sosialurin Postsmoga 76 · 110 Tórshavn
Merkið brævbjálvan: >>Heilsanir<<

# TILTØK

**Gudstænastur**
**25. sunnudag e. trinitatis**
***Havnar kirkja:*** Kl. 14 biskupsvígsla – Hans Jacob Joensen, biskupur vígir Jógvan Fríðriksson
***Hoyvíkar kirkja:*** kl. 11 Sverri Steinhólm, familjugudstænasta, Gentukórið úr Meinigheitshúsinum í Havn luttekur
***Argir:*** kl. 11, Hanus Simonsen, altargongd
***Vesturkirkjan:*** kl. 11 Heri J. Joensen
***Christianskirkjan:*** kl. 11, Lestur
***Kl. 20:*** Suð konsert í Christianskirkjuni kl. 20.

**Filadelfia, Landavegur 22**
Mikudagin kl. 17 bøn fyri Ísrael og Býnum
kl. 16-18 Delli (3. til 6. fl.)
Møtast í Bowlinghøllini kl. 15.50. Kostnaður 100,-
kl. 20-22 Chill (7. til 10. fl.)
www.filadelfia.fo

**Frelsunarherurin Tórshavn**
Mikudag kl. 15 Bønarløta.
Hósdag kl. 20 Heimaforbund fyri allar kvinnur.

**Samkoman Lívdin Í Hoyvíkar skúla**
Fríggjakvøldið kl. 21 ungdómsmøti.

**Missiónshúsið v/ Landavegin**
Hóskvøldið kl. 20 Møti.

**Hebron, Argir**
Mikudagin 21. nov. kl. 20 Bíbliutími og bønarløta. Markus kap. 8.

**Samkoman við Marknagil**
*Skúlaheimið, Marknagilsv.75*
Møti Sunnudagin kl. 10.30 Breyðbróting.
Sunnudagsskúli kl. 12.
Sunnukvøldið kl. 18 Evangeliskt møti
Mánakvøldið kl 20 Bønar/uppbyggingarmøti.

**Fríkirkjan Oasan Kirkjustræti**
Mikudagin kl. 7 bønarmøti.
Hósdagin kl. 7 bønarmøti, kl. 20 ungdómsmøti.
Fríggjadagin kl. 7 bønarmøti.

**Frá Kirkju- og missiónshúsinum á Argjum**
Hósdagin 22. nov. kl. 20 Bíbliutími við Jon Eli Johannesen, (2. Kor.13).
Fríggjadagin kl. 20 Ungdómsmøti v/ Sylverius Jacobsen, evni: Trúgv og ivi.

**Evangeliihúsið, Tróndargøta**
Mikudagin kl. 17.15 venur barnakórið.
Hósdagin kl. 16 eldrahugni.
Fríggjakvøldið kl. 19 ungdómurin hevur jólahugna, kl. 19 MiniSalt hevur jólahugna hjá Maibritt & Sveinbjørn.

**Ebenezer**
Mikudag kl. 17.15 Sangvenjing - Kassia,
kl. 20 Bønar- og uppbyggingarmøti - Talari: Oli á Grømma.
Hósdag kl. 20 Ungdómsmøti - Talari: Sonni Poulsen

**Frá Meinigheitshúsinum í Havn**
Mikukvøldið kl. 19.30 venur kórið.
Hósdagin kl. 16-16.45 venur gentukórið - fyri gentur frá 2. flokki.
Hóskvøldið kl. 20 Ungdómsmøti v. Tom Skaale, evni: Ivi og frelsuvissa.
Leygardagin kl. 9.30 Foreldur og børn.

**KFUM og KFUK í Havn**
Mikudagin kl. 19 í KFUM: Tensing kórið venur.
Hósdagin 22. nov. í KFUK: KFUK-kvøld fyri limir.

**Tórshavnar hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti, kl. 18 Evangeliskt møti.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Kollafjarðar Missiónshús**
Bønarløta hóskvøldið kl. 19.30.

**Filadelfia Vágar, Miðvágur**
Hóskvøldið kl. 20 ungdómsmøti.
Leygardagin kl. 16 bønarmøti.

**Miðvágs Missiónshús**
Missiónsvikan byrjar mikukvøldið kl. 20. Jóna Thomsen talar, Elsa & Jana syngja.
Hóskvøldið kl. 20 talar Jógvan Steintún og Steingjakórið syngur.
Fríggjakvøldið kl. 19:30 talar Ingolf Johannesen, Kirstin & Terje syngja. Barnaansing og drekka aftaná.
Fríggjakvøldið kl. 22 ungdómsløta. Hjartaliga vælkomin.

**Saron, Flatnavegur 7, Vestmanna**
Mikudagin 21/11, ungdómsmøti í Saron kl. 20.
Hósdagin 22/11, Barnaarbeiði í Saron kl. 19.

**Saron Haldórsvík**
Hósdagin 22/11 húsmøti hjá Henny Vík, kl. 20.
Ver hjartaliga vælkomin.

**Lívsins Orð, Saltangará**
Mikukvøldið kl. 20 Ungdómsmøti, kl. 20 Bønarmøti.
Hósdagin kl. 18 Tim5.

**Missiónshúsið Thabor, Toftir**
***Eldrasamkoma*** verður fríggjadagin 23. november kl. 16. Simony og Amaliel Knudsen syngja og siga frá.
Øll eru vælkomin!
Y.M.Barnaringurin bjóðar til Jólastovu í missiónshúsinum fríggjakvøldið 23. nov. kl 19
Børnini luttaka við sangi og leiki. Søla og burturluting til frama fyri Útimissión, sí annars Lýsingartorgið.
Øll eru hjartaliga vælkomin.
***Hugnaløta í missiónshúsinum***
Leygardagin 24. nov. kl. 20 verður hugnaløta í missiónshúsinum á Toftum, fyri sjófólkið, útróðrarmonnum, egnarum, landarum… og øðrum
Skrá:
Felagssangur, har »Regnaband« spælir
Andakt
Filmur frá Atlantic Navigator
Drekka
Spurnarkapping
Annað
Øll eru vælkomin!!!